TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 18.12.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir:

Ikki møtt: Bjarni Hammer

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 88/23 | 23/00374-1 | Býráðsfundir -fundardagar í 2024 |
| 89/23 | 23/00379-1 | FÆ2023 -Eykajáttanir, flyting millum íløgur og rakstrarstøð |
| 90/23 | 23/00385-2 | Umsókn um stuðul til nýggjárshald 2023/2024 (Nýggjársnevndin) |
| **Til kunningar** | | |
| 25/23 | 23/00044-1 | Skattatøl 2023 |
| 26/23 | 23/00383-2 | PISA -frágreiðing |
| 27/23 | 23/00349-2 | Varalimurin í nevndini í SEV fyri Suðuroy sagt seg frá |
| **Åben halv time** | | |
| | | |

**Til støðutakan**

## 88/23
## 23/00374-1 Býráðsfundir -fundardagar í 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 18.12.2023 | 88/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.12.2023**
Mælt verður til at hava býráðsfundir samb. niðanfyri skrá.

| Jan. | Feb. | Mar. | Apr. | Mai | Jun |
|---|---|---|---|---|---|
| Tór. 25 | Tór. 29 | Tór. 21 | Tys. 30 | Tór. 30 | Tór. 27 |

| Jul. | Aug. | Sep. | Okt. | Nov. | Des. |
|---|---|---|---|---|---|
| ongin | ongin | Tór. 26 | Tór. 31 | Tór. 28 | Tór. 19 |

### Býráðsfundir
Býráðsfundir eru vanliga eina ferð um mánaðin, -seinasta Tórsdag í hvørjum mánaði-. Allir býráðsfundir vera hildnir á Kommunuskrivstovuni, á Tvøravegi 37, í býráðssalinum kl. 17.00.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega verða býráðnum í hendi í seinasta lagi hin 5 dagin í mánaðinum, sum býráðsfundurin er.

Umframt regluligu býráðsfundirnar kann býráðið halda eykafundir, tá ið støða skal verða tikin til týdningarmikil mál, sum hava skund.

juli og august heldur býráðið summarfrí.

### Fíggjarnevndin
Fíggjarnevndin hevur vanliga fund, tórsdag vikuna fyri sum býráðsfundur er.
Mál, ið ynskjast viðgjørd í Fíggjarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5 dagin í mánaðinum, sum fíggjarnevndarfundur er.

### Sosialanevnd
Sosialanevndin hevur vanliga fund, í vikuni fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Sosialunevnd, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum sosiala nevnd hevur fund.

### Mentanarnevndin
Mentanarnevndin hevur vanliga fund, týsdag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Mentanarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum mentanarnevndin hevur fundur.

### Tekniska nevnd
Tekniska nevnd hevur vanliga fund, mánadag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Teknisku nevnd, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum tekniskanevnd hevur fund.

### Trivnaðar- og umhvørvisnevndin
Trivnaðar- og umhvørvisnevndin hevur vanliga fund í vikuni fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Trivnar- og umhvørvisnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum Trivnar- og umhvørvisnevndini hevur fund.

### Vinnu- og havnanevndin
Vinnu- og havnanevndin hevur vanliga fund, mánadag vikuna fyri sum fíggjarnevndar fundur er.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Vinnu- og havnarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum Vinnu- og havnarnevndin hevur fund.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018 (Kommunustýrislógin) Kapittul 3, Kommunustýrisfundir

§ 13. Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nærri reglur um vanligar fundir skulu vera ásettar í fundarskipanini. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.
Stk. 2. Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess.

**Tilmæli:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**<u>Býráðið 18. december 2023:</u>**
Samtykt at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum.

**89/23**
**23/00379-1 FÆ2023 -Eykajáttanir, flyting millum íløgur og rakstrarstøð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.12.2023 | 85/23 |
| 2 Býráðið | 18.12.2023 | 89/23 |

**Málslýsing: (Kommunustjorin 05.12.2023)**
Fíggjardeildin hevur pr. 13. des. gjørt upp yvirlit yvir játtanir FÆ2023 og realisera kostnað á rakstrarstøðum. Avgjørt hevur verði at fremja umraðfestingar í avsetingunum til løgur og rakstur og er tí neyðugt við flytan av játtan á rakstrarstøðum. Neyðugt hevur verði við hægri rakstrarjáttan á einkultum rakstrarstøðum, eins og minni nýtsla hevur verði á summum rakstrarstøðum.

Eykajáttanirnar eru metingar hjá fíggjarleiðara og kommunustjóra og eru grundaðar á fyriliggjandi uppgerð, og verða allar umraðfestingar játtaðar innan fyri sama rakstarstað.

Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til, at fíggja eykajáttan innan fyri verandi fíggjarkarm við flytingum av játtanum innan hvørja grein sær, samsvarandi niðanfyri yvirlit *"Eykajáttanir 2023"*. -Málið skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnum.

TVØROYRAR KOMMUNA

# Eykajáttanir í 2023

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 126 | Býráðið | Ferðing | 110.000,00 |
| Til | 112 | Val | | 16.500,00 |
| Til | 115 | Fyrisiting | Løgur | 120.000,00 |
| Til | 116 | Kommunufelagið | Limagjald | 6.000,00 |
| | | | | 252.500,00 |
| Frá | 118 | Tekniska deild | Minni løn | -252.500,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 210 | Kommunulæknar | | 80.000,00 |
| | | | | 80.000,00 |
| Frá | 214 | Barnatannrøkt | Minni løn | -80.000,00 |
| | | | | -80.000,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 300 | Ungdómshúsið | | 20.000,00 |
| Til | 314 | Ung í arbeiði | | 145.000,00 |
| Til | 316 | Spælipláss | | 10.000,00 |
| | | | | 175.000,00 |
| Frá | 312 | Frítíðarskúlin | Minni løn | -175.000,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 414 | Forskúlin | | 200.000,00 |
| Til | 418 | Eftirskúlin | | 55.000,00 |
| | | | | 255.000,00 |
| Frá | 411 | Skúlin | Minni íløga | -255.000,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 515 | Jólapynt | | 70.000,00 |
| Til | 537 | Við Stórá | | 475.000,00 |
| | | | | 545.000,00 |
| Frá | 516 | Vitjan og umboðan | | -300.000,00 |
| Frá | 524 | Stuðul til ítrótt | | -145.000,00 |
| Frá | 528 | Bygdarsavnið | | -100.000,00 |
| | | | | -545.000,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 609 | Bygningar | Útvega íløga | 1.400.000,00 |
| Til | 613 | Ídnaðarøkir | Útvega íløga | 200.000,00 |
| Til | 614 | Fríðkan | | 500.000,00 |
| Til | 615 | Fríðkan | | 180.000,00 |
| Til | 624 | Vegir | Meira løn | 900.000,00 |
| Til | 625 | Vegir | Meira asfalt | 1.300.000,00 |
| Til | 629 | Maskinur og bilar | Meiri íløga | 110.000,00 |
| | | | | 4.590.000,00 |
| Frá | 619 | Kirkjugarð | Minni íløga | -1.500.000,00 |
| Frá | 621 | Varnverkið | Minni íløga | -810.000,00 |
| Frá | 623 | Kloakkir | Minni íløga | -1.880.000,00 |
| Frá | 630 | Umhvørvistiltøk | | -100.000,00 |
| Frá | 632 | Viðalundin | | -300.000,00 |
| | | | | -4.590.000,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 721 | Bátahylur | Meiri íløga | 3.000.000,00 |
| | | | | 3.000.000,00 |
| Frá | 719 | Tvøroyrar Havn | | -3.000.000,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 810 | Rentustuðul | Meiri rentur | 500.000,00 |
| Til | 820 | Rentuútreiðslur | Meiri rentur | 620.000,00 |
| | | | | 1.120.000,00 |
| Frá | 830 | Kommunuskattur | Meira skattur | -1.120.000,00 |

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023 -flytan millum íløgu og rakstarjáttanir

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 18. december 2023:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá fíggjarleiðaranum og kommunustjóranum. Málið verður beint í Býráðið.

**Býráðið 18. december 2023:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.
Málið skal fyri aftur í Býráðnum.

**90/23**
**23/00385-2 Umsókn um stuðul til nýggjárshald 2023/2024 (Nýggjársnevndin)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.12.2023 | 95/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.12.2023 | 86/23 |
| 3 Býráðið | 18.12.2023 | 90/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.12.2023**
Til umrøðu er umsókn um stuðul frá Tvøroyrar Nýggjársnevnd v./ Signar Strøm at skipa fyri nýggjárshaldið, har upplýst verður, at stuðulin skal brúkast til keyp av fýrverk og annað ísamb. arb. hjá Tvøroyrar Nýggjársnevnd

**Kommunustjórin mælir til at:**
Tvøroyrar Kommuna heitur á Tvøroyrar Nýggjársnevnd um at fyriskipa nýggjárshald 2023/2024 vegna Tvøroyrar kommunu. At veita nýggjársnevndini eina stuðulsupphædd at fyriskipa nýggjárshaldið, har nýggjársnevndin fyrireikar øll viðurskiftir kring nýggjárshaldið, í samráð við ásetingar og krøv frá átaksleiðaranum. At kommuna ikki eftirfylgjandi ber annan kostnað av nýggjárshaldinum.

**Lógargrundarlag: Kommunusfulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2023, §5.24.14 Stuðul til ítróttar- og mentanarmál**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 12. december 2023:**
Signar Strøm møtti á fundinum fyri at greiða frá arbeiðinum hjá Nýggjársnevndini. Signar Strøm kunnar um og mælir til, at Nýggjárshaldið framyvir verður skipa úti á Tvøroyri, á Havvnarlagnum, Molanum, Miðbýnum heldur enn í Trongisvági. Mentanarnevndin mælir einmælt til, at lata kr. 50.000,- í stuðul. Málið verður beint í Fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 13.12.2023:**
Mint verður á samtykt í fíggjarnevndini hin 18. des. 2020 og býráðnum 21. des., har átaksleiðarin mælir frá at nýggjárshald verður brent í Miðbýnum, hetta grunda á, at tætt er millum húsini, eins og vinnubygningar er her, ið hava sjálvvirkandi sløkkiútgerð.

**Fíggjarnevndin 18. december 2023:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, at lata stuðul kr. 50.000,-
Samstundis vil nevndin mæla býráðnum til at tosa við partarnar sum hava við í hesum í síðstu árunum.
Átaksleiðarin vitjaði nevndina.

**Býráðið 18. december 2023:**
Býráðið mælir frá at nýggjárshaldið verður flutt út á Tvøroyri, men mælir heldur til, at betra um umstøðurnar í Trongisvági.

**Til kunningar**

## 25/23
## 23/00044-1 Skattatøl 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 3/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 3/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 4/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 6/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 5/23 |
| 6 Býráðið | 27.04.2023 | 9/23 |
| 7 Fíggjarnevndin | 31.05.2023 | 6/23 |
| 8 Býráðið | 31.05.2023 | 13/23 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.06.2023 | 7/23 |
| 10 Býráðið | 19.06.2023 | 18/23 |
| 11 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 8/23 |
| 12 Býráðið | 28.09.2023 | 20/23 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 11/23 |
| 14 Býráðið | 26.10.2023 | 22/23 |
| 15 Fíggjarnevndin | 28.11.2023 | 13/23 |
| 16 Býráðið | 30.11.2023 | 24/23 |
| 17 Fíggjarnevndin | 18.12.2023 | 14/23 |
| 18 Býráðið | 18.12.2023 | 25/23 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 01.02.2023
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2022/2023

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023/2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 24. april 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. april 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 19. juni 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 19. juni 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað. -málið verður beint í býráði

**Fíggjarnevndin 18. december 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 18. december 2023:**
Býráðið er kunnað

**26/23**
**23/00383-2 PISA -frágreiðing**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.12.2023 | 5/23 |
| 2 Býráðið | 18.12.2023 | 26/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 8. Des. 2023**
Til kunning og umrøðu verður latið Tvøroyrar býráð PISA frágreiðing

Týsdagin 5. des. var frágreiðingin fyri PISA-kanningina 2022 løgd fram í Kongshøll. Rithøvundarnir av frágreiðingini greiddu frá úrslitunum og gongdini í kanningini og handaðu landsstýrismanninum frágreiðingina.

PISA kanning, ið verður framd av OECD triðja hvørt ár, er grundað á námsfrøðiligt og vísindaligt granskingararbeiði. Tað eru næmingar í 9. flokki, sum eru við í kanningini. Endamálið við hesi kanning er at staðfesta, hvussu skúlaverk og næmingar okkara eru fyri samanborið við skúlaverk og næmingar í øðrum londum, og hvat vit eiga at gera fyri alla tíðina at betra um skúlan.

**Føroysku úrslitini í PISA royndunum 2022 vísti eina serliga stóra afturgongd í støddfrøði, og á eina minni afturgongd bæði í føroyskum og náttúruvísindi.**

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022.

*§ 1. Fólkaskúlin er tann almenni skúlin, sum býður undirvísing eftir hesi lóg.*

*§ 2. Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.*
*Stk. 2. Fólkaskúlin eigur at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúp-hugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.*
*Stk. 3. Fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við foreldrini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling. Hann skal við støði í heimligari mentan menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna. Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.*

*§ 3. Innan fyri settar karmar hevur tann einstaki skúlin ábyrgdina av undirvísingardygdini sambært endamáli fólkaskúlans, smb. § 2, og innan fyri hesar karmar ger skúlin av, hvussu hann skipar og leggur sína undirvísing til rættis.*
*Stk. 2. Skúlin samstarvar við næmingar og foreldur um at megna tað, sum er ásett í endamálsgrein fólkaskúlans.*

*§ **4.** Fólkaskúlin er ein 9 ára grundskúli og ein 1 árs 10. flokkur.*
*Stk. 2. [2] kommunur ella skúlasambond, sum hava 120 ella fleiri næmingar í 10. flokki, kunnu við góðkenning landsstýrismansins skipa ein felags 10. floks skúla við sjálvstøðugari leiðslu fyri allar 10. floks næmingarnar í kommununi ella skúlasamstarvinum. Landsstýrismaðurin kann í serligum føri víkja frá ásetta næmingtalinum.*

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Mentanarnevndin 12. december 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 18. december 2023:**
Býráðið er kunnað.

**27/23**
**23/00349-2 Varalimurin í nevndini í SEV fyri Suðuroy sagt seg frá**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.10.2023 | 72/23 |
| 2 Býráðið | 18.12.2023 | 27/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 26.10.2023**
Umsitingin hevur í dag 26. okt. 2023 móttikið teldupost frá SEV:

*Til allar kommunurnar í Suðuroy.*

*Varalimurin í nevndini hjá SEV umboðandi Suðuroy Arnbjørn í Smiðjuni hevur sagt seg frá sum varalimur sambært telduposti móttikin 10. apríl 2023.*

*Sambært viðtøkum felagsins eru tað limakommurnar í Suðuroy, sum velja varalimin.*

*Fyri nevndina í SEV skal tí verða spurt um, hvørt ynskt verður, at nýggjur varalimur verður valdur. Um so er, so skal/skulu ein ella fleiri kommunur í Suðuroy boða SEV frá, at hetta verður ynskt á skrá til ein aðalfund.*

*Viðmerkjast skal, at slík fráboðan skal verða nevndini í hondum í so góðari tíð, at valið kann takast við í fundarskránna fyri viðkomandi aðalfund.*

*Vinalig heilsan, Elfelagið SEV, Kári Johansen, nevndarformaður*

*Viðtøkur fyri SEV:*

- Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevnd sambært
- Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna ein nevndarlim.
- Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir og atkvøða um hesi.
- Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjur varalimur verður valdur.
- Tá ið nevndarlimur verður valdur, skal eisini veljast varalimur, ið tekur við, tá nevndarliminum berst frá.
- Nevndarlimurin boðar varaliminum og SEV frá, tá honum berst frá.
- Nevndin skipar seg skjótast gjørligt eftir hvørt val og velur ímillum nevndarlimirnar

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Kristin Michelsen mælir til at velja umboði hjá Hvalbiar kommunu til varalim.- Einmælt samtykt

**Býráðið 30. november 2023:**

Borgarstjórin mælir til, at Alvi Mortensen fær fulltrú at atkvøða vegna Tvøroyrar kommunu. Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 8.12.2023:**

Til kunning og umrøðu fundarsamtykt á SEV fundi 8. des. 2023

Samtyktin hjá Tvøroyrar býrða hin 26. oktober, at velja umboð úr Hvalbiar kommunu til varalim í nevndina fyri SEV fall á eykaaðalfundinum 8. des. Bert uppskotið hjá Tvøroyrar kommunu var innsent til skránna á SEV fundinum, men á sjálvum fundinum var lagt fram móttuppskot av Vágs kommunu, um at velja umboði úr Porkeris kommunu til varaumboð fyri Suðuroynna, ið bleiv samtykt við meiriluta vali 4/3, av Sumbiar, Vágs, Porkeris og Hovs kommunu.

Skráðin til SEV fundin 8. des. var annars henda:

*1. Val av fundarstjóra*
*2. Frágreiðing frá nevndini um felagsins virksemi síðani ársaðalfundin*
*3. Kunning frá nevndini um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin*
*4. Uppskot til fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár til góðkenningar*
*5. Uppskot frá nevndini um endurnýgging av loyvi/heimild til, at SEV kann gera broytingar í teimum til eina og hvørja tíð verandi láníavtalum hjá SEV*
*6. Uppskot frá Tvøroyrar kommunu um val av nýggjum varalimi fyri nevndarlimin fyri Suðuroy.*
*7. Kunning frá nevndini um verkætlanina viðvíkjandi pumpuskipan v.m. nevnd "Mýruverkið II".*

*Nevndin í Sev hevur yvirstjórnina í felagnum. Nevndin aftaná, at nýggj verður vald á aðalfundi í seinasta lagi tveir mánaðar kommunustýri hava tikið við.*

*Sjey limir eru í nevndini: Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur eiga ein lim í part, og Suðuroyggin og Tórshavnar Kommuna hava hvør sín nevndarlim.*

*Nevndarlimir verða valdir við, at hvør limakommuna setir upp nøkur valevnir í sínum øki og atkvøðir um hesi.*

*Tá ið nevndarlimur verður valdur, skal eisini veljast varalimur, ið tekur við, tá ið nevndarliminum berst frá. Nevndarlimurin boðar varaliminum og Sev frá, tá honum berst frá. Flytur nevndarlimur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjur varalimur verður valdur.*

*Nevndin skipar seg skjótast gjørligt eftir hvørt val og velur formann og næstformann ímillum nevndarlimirnar. Næstformaðurin tekur við starvi formansins, tá ið hesum berst frá.*

*Starvstíðin hjá nevndini er hin sama sum hjá kommunustýrum. Fráfarandi nevnd verður tó sitandi, til nýggj er vald.*

Suðuroyggin er nú umboða í nevndini í SEV av Niclas Hentze, bygdaráðslimi úr Sumbiar kommunu og Andreas Berg bygdaráðslimi úr Porkeris kommunu.

**Býráðið 18. december 2023:**
Býráðið er kunnað.

[Gem]

Fundurin lokin kl.18:00

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

~~Bjarni Hammer~~

Kristina Roest

Eyð Jóna Eidesgaard